## Flagga í Sundalagnum

Í góðveðrinum mánadagin í farnu vant formaðurin í Trivnaðarnevndini, Asbjørn Djurhuus, nýggja flaggið hjá kommununi á stong sunnanfyri skrivstovuna á Oyrarbakka. Flaggið er sniðgivið í ljósum litum, sum búmerkið hjá kommununi setir sín dám á. - Vit halda, at flaggið á ein góðan hátt ímyndar eina unga og livandi kommunu, ið vil gróður og vøkstur fyri alt Sundalagið, verður sagt úr kommununi. Vónað verður, at flaggið í øllum veðri og árstíðum fer at bera boð um eina sterka kommunueind, ið fer at leggja lunnar undir framhaldandi menning fyri tey, sum búleikast her um leiðir, og virka fyri einum góðum gerandisdegi hjá øllum borgarum.

## Tryggari ferðsla Millum fjarða

Landsverk fer nú undir eina royndarverkætlan á landsvegnum Millum Fjarða í Eysturoynni, sum skal eggja bilførarum til at halda lógarásettu frástøðuna til bilin, sum koyrir frammanfyri. Hagtølini vísa, at nógv ferðsluóhapp henda og at summi fáa klipp í koyrikortið, tí at tað er ov stutt millum bilarnar. Seinastu fimm árini eru umleið átta prosent av øllum óhappum á landsvegnum, har politifrágreiðing er skrivað hend, tí at tað hevur verið ov stutt millum bilarnar. Fyri at varpa ljós á vandamálið og at bøta um ferðslutrygdina fer Landsverk nú undir eina royndarverkætlan við vegaskeltum og pílum, ið verða málaðir á vegbreytina, sum skulu tryggja, at bilførararnir halda tað neyðugu frástøðuna. Gongst sum ætlað verða vegmerkingar og vegaskelti líðug einaferð seinni í hesi vikuni.

# 50 tons av vatni endaðu inni í nýggja herberginum



*Sámal Jákup Joensen (høgrumegin) og Finnbogi Olsen eru í holt við at taka gólv og bjálving upp í niðastu hæddini, har 50 tons av yvirflatu-og kloakkvatni endaðu*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



**Í sínari tíð gingu mong við kenning í Kagganum, og ivaleyst mundi onkur av og á vera ríkiliga fullur, men nú Frelsunarherurin eigur bygningin og skal umbyggja hann til herberg, gjørdist Kaggin fullur – fullur av yvirflatu- og kloakkvatni**

VATNSKAÐI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var ikki nøkur tespilig sjón, sum møtti Sámal Jákupi Joensen, samkomuleiðara hjá Frelsunarherinum, tá hann ein dagin herfyri hugdi inn á gólvið í bygninginum, sum samkoman hevur keypt til nýtt herberg fyri heimleys.

- Tað var myrkt, og eg gjørdist skakkur, tá eg varnaðist, at vatn í niðastu hædd stóð mær upp um øklarnar.

Samkomuleiðarin sigur, at nú arbeiði at umbyggja húsið til herberg enn ikki er byrjað, tí tekningar og loyvir fyrst skulu fáast til vega, hevur fólk ikki verið í húsinum hvønn dag.

- Tá vit kannaðu eftir, hvussu alla henda nøgdin av vatni kundi vera komið inn í húsið, vísti tað seg, at húsið hevur eina serliga pumpuskipan, og tað er henda skipan, sum av eini ella aðrari orsøk var hildin uppat við at virka.

Hann sigur, at niðasta hæddin av húsinum liggur so lágt, at neyðugt er við pumpuskipan til frárensl, har bæði yvirflatuvatn á ognini og avlopsvatn frá eitt nú septiktanganum verða savnað í brunn og síðan pumpað út í kommunalu kloakkirnar.

- Sum dagarnir eru gingnir, og pumpuskipanin hevur verið óvirkin, er nøgdin av vatni vaksin og er at enda komin upp ígjøgnum ristirnar og inn í bygningin.

### 50 tons av vatni

Sámal Jákup sigur, at neyðugt var at senda boð eftir kloakksúgvaranum hjá Tórshavnar Kommunu, og so nógv vatn var inni í niðastu hædd, at tey at enda mistu talið av bilum, sum koyrdu fullir avstað aftur.

- Bilarnir taka einar 10.000 litrar hvør, og eg haldi, at einir fimm bilar koyrdu fullir avstað. Soleiðis tóku bilarnir einar 50.000 litrar – ella eini 50 tons - av yvirflatu- og kloakkvatni úr niðastu hæddini.

Hann sigur, at hóast vatnið úr septiktanganum er runnið saman við yvirflatuvatninum, luktaði tað ikki væl at koma í húsið eftir stóra vatnskaðan.

- Tað hevur hóast alt ikki gjørt støðuna verri, at kloakkvatnið er blandað saman við yvirflatuvatni, men neyðugt er at taka alt gólvið upp í niðastu hæddini.

Undir gólvplátunum liggja bjálvingarmáttur, og tí má alt skiftast og byggjast av nýggjum. Niðasti parturin av vegginum hevur tikið skitna vatnið í seg, og her verður eisini neyðugt at skifta.

### Ókend orsøk

Sámal Jákup ásannar, at hann kendi ikki skipanina við pumpuverkinum so væl og í smálutum, sum hann nú ger.

- Í fyrstani hildu vit, at orsøkin til vatnskaðan var ein tøppur, sum hevði sett seg í skipanina, soleiðis at vatnið ikki slapp at renna frá. Men nú greiða er fingin á, hvussu skipanin hongur saman, og hvussu hon virkar, vita vit betur.

Hann sigur, at enn er full greiða ikki fingin á, hvør orsøkin er til, at pumpuskipanin gjørdist óvirkin.

- Vit hava havt elektrikarar her, og líkt er til, at rele eru sligin frá, men hví hetta er hent, vita vit ikki ítøkiliga. Um orsøkin kann vera toruslátttur ella ójavnur spenningur á el-skipanini, vita vit heldur ikki. Tað ber eftir øllum at døma ikki til at staðfesta, hví óhappið hendi.

Tá Frelsunarherurin keypti Kaggan, var tað við tí endamáli at umbyggja bygningin til herberg og annað virksemið í tí sambandi hjá Frelsunarherinum.

- Í so máta eru vit heppin, at umbyggingararbeiði ikki longu var byrjað, tí tá hevði verið neyðugt at tikið alt uppaftur og gjørt arbeiði í niðastu hæddini av nýggjum.

Sámal Jákup sigur, at ætlanin annars ikki var at taka gólvið í niðastu hæddini upp, men nú er so eingin møguleiki at sleppa undan hesum.

- Hetta er sjálvandi eitt bakkast, men málið hjá Frelsunarherinum er framvegis, at nýggja herbergið veður umbygt og tikið í nýtslu skjótast gjørligt.

Umbyggingin verður nú teknað, og síðan skulu øll loyvi útvegast.

- Tá alt hetta er komið upp á pláss, fara vit í gongd við umbyggingina, sigur hann.

### Tekur ikki við

Sámal Jákup Joensen sigur, at samkoman eftir hendingina hevur verið í samband við stovnin, har ognin er tryggjað.

- Men her hava vit í fyrstu syfti fingið at vita, at tryggingin dekkar ikki. Tey siga, at vatnið er komið uttanífrá, og at tað er okkara skipan, sum er gingin fyri. Tryggingarfólkini hava kortini verið blíð og fyrikomandi og hava sagt seg vilja vera positiv at royna at finna eina loysn. Hvat liggur í hesum, vita vit ikki í løtuni, men vit vóna, at vit kunnu koma til sættis um onkra loysn, sum sømir seg og er virðilig fyri báðar partar, sigur hann.